# Kjak



Jústinus Leivsson Eidesgaard

## Tollut skriving um týskarar

*Kári av Rógvi er lopin fram av í sinnismuni, og hann hevur viðgingið tað alment. Hann hevur fornermað eina tí máttugastu tjóðina í heiminum. Tað ber til at siga ov nógv, og er ein maður fyri at viðganga tað, er framvegis virðing um mannin*

At síðan blaðskriving aftaná fer at verja tað, sum Kári hevur ført fram í sinnismuni, er beinleiðis tollut og tollut er sambært orðabókini hálvbýtt ella fjákut.

Seinni heimsbardagi endaði í 1945 og tað eru 65 ár síðani. Tað eru bara núlivandi týskarar, sum eru omanfyri 85 ár, sum kunnu ábyrgdast fyri nakran av teimum ræðuleikum, sum fóru fram undir seinna heimsbardaga.

Tað vil siga, at ein og hvør føroyingur, sum roynir at turka egna undirlutakenslu upp í ræðuleikarnar hjá týskarum undir seinna heimsbardaga, fyri at hevja seg sjávan, kemur at raka eini 80 milliónir ósekar týskarar, áðrenn hann kanska rakar onkran einstakan sekan millum tær seinastu fimm milliónirnar í fólkaríkastu tjóðini í Europa.

Og tílíkt er tollut.

Eg havi búð í Hamborg, og týskarar eru virðiligt fólk at liva saman við í dag. Nazisman fekk rættuliga fastatøkur í Týsklandi, fór fullkomiliga yvir gevind, misti tamarhaldið og endaði í sorgarleiki. Hon kundi eins væl fingið fastatøkur aðrastaðni í fasistiska Europa um tað mundið. Eitt nú var bretski yvirklassin ógvuliga vinarliga sinnaður móti nazistunum.

Sum ungur var eg villur við knívinum í grindadrápi. Í dag setir tað at hjartanum, tá ið eg eri vitni til eitt grindadráp. Tað er við blandaðum kenslum og harmi í hjarta, at eg skrivi meg upp og farið eftir seðlinum. Mær dámar enn stak væl grind, og eg kann eisini vera hana fyri uttan.

Kanska prísurin fyri grindadráp verður okkum ov dýrur í framtíðini, eg veit tað ikki, og eg havi ein sterkan illgruna um tað.

TØKK

Vit vilja takka fyri sýnda samkenslu, hjálpsemi og stuðul, tá kæra kona mín og móðir okkara

Gunhild Petersen

andaðist og varð jarðað.

Leivur, Kári, Anna Maria og Marjun

www.ebenezer.fo

SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00

Øll eru hjartaliga vælkomin!



EBENEZER



Bergur A. Dalsgarð
*Sosialistisk Ung*

## Órættvíst »Kostnaðarendurgjald« til tingfólk

Onkur segði, at tingfólk ikki eru høgt lønt. Hetta er tó bert sannleikin, um hugt verður eftir sjálvari lønini, sum tingfólkið fær útgoldið. Við síðunar av hava tingfólk nevniliga eina eyka inntøku, ella "kostnaðarendurgjald", sum tað so pent eitur. Hetta er endurgjaldið fyri útreiðslur í samband við ferðing til og frá arbeiðsplássinum, tvs. Tórshavn, og fyri vanlig fólk kallast hetta ferðaendurgjald.

Ein tingmaður úr Viðareiði fær 81.000 krónur um árið í "kostnaðarendurgjald". Eitt vanligt fólk úr Viðareiði, sum ferðast til Havnar at arbeiða hvønn dag, fær 13.000 krónur í endurgjald. Eitt tingfólk úr Gøtu, sum skal ferðast til Havnar, fær 54.000 krónur. Arbeiðarin fær 6.400 krónur við sama bústaði og somu arbeiðsdestinatión. Tingfólkið, sum býr í Gøtu, fær sostatt átta og eina hálva ferð meira í ferðaendurgjald enn vanligi gøtumaðurin, sum arbeiðir í Havn. Eru tingfólkini dýrari at flyta enn vanlig fólk? Kanska hava tingfólkini bilar, sum slúka átta ferðir meira bensin enn bilarnir hjá vanligum fólki? Nei, sannleikin er, at tað eru tingfólkini sjálvi, sum áseta hetta "kostnaðarendurgjaldið".

Tølini koma frá skjølum, sum øll hava innlit í, og er talan um eitt endurgjald, sum fyri tingmannin úr Viðareiði svarar til 162.000 krónur fyri skatt. Upphæddin av endurgjaldinum er tengd av, hvørt tingmaðurin møtir til arbeiðis ella ikki, tey fáa fyri 100 dagar, og missa tey ein, verða tey trekt fyri 1/100 av upphæddini. Men skipanin er ikki bygd uppá eina realistiska meting av, hvør veruligi kostnaðurin er fyri ferðingina. Tí er hetta ein órættvís og ósolidarisk skipan.

Vit í Sosialistisk Ung vilja staðiliga mæla til, at "kostnaðarendurgjaldið" verður avtikið, og at tingfólkini koma undir somu skipan sum vanlig fólk. Væl kann vera, at ein ikki velur, hvar sítt egna arbeiðspláss liggur, men tað er ikki grundarlag fyri at gera eina skipan, sum hevur til endamáls at rinda ovurstórt endurgjald til sín sjálvs.



Dagfinnur Danbjørg

## Er kikaran framvegis fyri blinda eyga, tá talan er um mvg-stuldur og skattasvik?

Einar 200 - 250 mill. kr., sum eftir landsins lógum hoyra heima í landskassanum, svimja framvegis frítt millum hávar og heykar, sum óttaleysir kunnu halda áfram við hesum ólógliga og undirgravandi virksemi, ið - fyriuttan at vera landsskaðiligt - eisini skaðar tey mongu, ið av eini ella aðrari orsøk hava stuðul fyri neyðini, og sum av somu orsøk mugu sita við skerdum ella ongum stuðli.

Onkur helt fyri, tá málið var uppi at venda, at sicilianska mafian hevði rodnað yvir egna dugnaloysi, høvdu teir sæð skilið ella kanska rættari sagt skipaða óskilið á mvg- og skattaøkinum í Føroyum.

Seta vit stuldurin og svikini í perspektiv, so hevði tilsvarandi í DK svara til umleið 25 milliardir kr. og í Italia hjá mafiabossunum 300 milliardir kr (av sonnum ongir smápengar).

Hetta hevði so ongastaðni gingið uttan í Føroyum. Um TAKS ikki hevur neyðuga peningin ella nokk av kvalifiseraðum fólki, til at røkja sínar uppgávur, so eiga teir at fáa bæði tey nevndu í stundini, tí útreiðslurnar eru peanuts við síðuna av vinninginum, ið tá verður at standast av teirra økta virki.

Fíggjarmálaráðharrin og/ella TAKS, eiga at greiða Føroya fólki frá, um kikarin framhaldandi verður settur fyri blinda eyga, ella um nøkur munagóð stig verða tikin, soleiðis at hann ístaðin verður settur fyri síggjandi eygu.